


va við flogførunum hjá Atlantic Airways var eg ongantíð í iva. At flúgva upp á Føroyar var ein avbjóðing, sum eg stutt sagt ikki kundi siga nei til. Hetta er ein spennandi og gleðilig tíð, ikki minst eftir ta sera góðu tlantic Airways, sigur Anette Larsen

Airways fekk trý nýggj flogfør inn í flotan av sama slagi, sum felagið alla tíðina hevði havt, og so komu nakrir av flogskiparunum, sum høvdu flogið við Dash-8 flogførunum, yvir at flúgva við BAE 146 hjá Atlantic Airways.

- Støðan var jú hon, at SAS kundi ikki her og nú útvega 22 nýggj flogfør, og hinvegin kundi Atlantic Airways heldur ikki fáa fatur á 30 nýggjum flogskiparum, sum teir kundu umskúla alt fyri eitt til slagið av flogførum, sum teir hava. So talan var um eina sonevnda win-win støðu fyri báðar partar, sigur Anette Larsen.

## Ikki so ringt sum sagt veðrur

Hetta førdi so til møguleikan at flúgva við flogfarinum BAE 146, ella Avro í eitt sindur meiri framkomnari útgávu.

- Tað er ein stórur munur á at flúgva hetta flogfarið og so tað propell-flogfarið, sum eg framman undan hevði flogið. Eisini var hetta ein sera stór avbjóðing, tí Avro'in er bygdur til nakrar serstakar uppgávur. Flogfarið kann ymiskt, sum onnur ferðafólkaflogfør stutt sagt ikki kunna, og ongantíð fara at kunna. So reint fakligt var hetta ein ógvuliga stór avbjóðing, og eisini ein frægd fyri meg at kunna flúgva á egnu rutunum hjá Atlantic Airways, og ikki bara til teir flogvallir, sum vit vóru von við at flúgva til út frá Keypmannahavn, sigur Anette Larsen.

Ofta verður flúgving upp á Føroyar tengd saman við innflúgvingsviðurskiftunum, ið sum kunnugt tíðum kunnu vera trupul, serliga tá hugsað verður um tann turbulens, sum kann vera. Men í so máta hevur Anette Larsen verið ógvuliga heppin.

- Eg havi bert einaferð upplivað hendan turbulensin, sum eg havi hoyrt tosað so nógv um, allar teir tíggju mánaðirnar, eg havi flogið upp á Føroyar. Eg byrjaði at flúgva upp á Føroyar beint eftir páskir í 2008, og tá var eitt langt tíðarskeið við støðugum veðri. Klárt og sólskyn við góðum vindviðurskiftum, og tað gevur sera góðar umstøður at læra ein flogvøll at kenna. Partvís sær tú landslagið uttan um teg og lærir, hvussu fjøllini standa, tú sær tað við tínum egnu eygum og ikki bara á einum korti. Og partvís lærdi eg flogfarið væl at kenna við at lenda og fara á flog á relativt stutta vøllinum, sigur Anette Larsen.

Men tað hava kortini ikki bara verið góðir túrar, hon hevur havt sín part av vánaligum veðri.

- Men eg vil siga, at flogvøllurin er betri enn tað, sum eg framman undan hevði hoyrt um hann. Ella havi eg kanska bara hoyrt um teir serliga ringu túrarnar. Sjálvandi eru dagar við vánaligum veðri við nógvum vindi og ringum sýni, men eg havi verið heppin og vard fyri teimum ekstremu innflúgvingarstøðunum, sum onkuntíð kunnu verða, sigur Anette Larsen.

## Heilt øðrvísi

Men hvussu er so at flúgva upp á Føroyar í mun til teir flogvøllir, sum hon annars er von at flúgva til.

Næstan so øðrvísi, sum tað kann vera. Har, eg vanliga flúgvi, er talan um langar flogbreytir, har eisini flúgva heilt stór flogfør, og tí eru breytirnar tveir og tríggjar, heilt upp í fýra kilometrar langar, og landslagið er púra flætt. Tú kanst siga, at tað er rættiliga lætt at flúgva til ein slíkan flogvøll. Sjálvandi skal tú gera so sum tað stendur í vegleiðingini, men um tú kemur eitt sindur skeivt inn í innflúgvingini, so hevur tað ikki tann stóra týdningin, tí landslagið uttan um er so slætt, at eingin vandi kann standast av tí, sigur Anette Larsen.

Hon sigur, at tá er tað heilt øðrvísi at lenda í Føroyum.

- Í Føroyum hevur tú ikki ráð at raka við síðuna av. Landslagið er ein faktorur, longdin á breytini er ein annar faktorur. Breytin er 1230 metrar, og tað eru langt frá øll ferðafólkaflogfør, sum megna at lenda á so stuttum vølli, men júst hetta slagið av flogførum, sum Atlantic flýgur við, megnar tað, sigur Anette Larsen.

Men tað finst eisini ein triði og avgerandi faktorur, tá tú flýgur upp á Føroyar.

- Typografiin og innflúgvingins mannagongdirnar eru heilt øðrvísi. Á fakmáli nevnist tað »Non Presicion Approach«. Á vanligum flogvøllum hava vit tól sum vísa bæði vatnrættan og